# Siloa og Salt



*Saman við Salt fer Siloakórið leygardagin at hava framførslu í Norðurlandahúsinum*

**Eftir at tey seinastu viku sungu í Fuglafirði, verður tað hesaferð Norðurlandahúsið, sum er karmur um konsertina**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Leygardagin kl 16 verður konsert í Norðurlandahúsinum, har sangkórið í Siloa og sangbólkurin, Salt, syngja.

Júst hesi bæði høvdu eina væleydnaða konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði seinasta sunnukvøldi, og vóru tá um 300 fólk og lýddu á.

Siloakórið sang 12 sangir í tveimum umførum og Salt 10 sangir somuleiðis í tveimum umførum. Bæði kór og sangbólkur høvdu eina fjølbroytta skrá.

Úrvalið hjá Siloakórinum var serliga rútmiskir sangir hjá Oslo Gospel Choir, Andrae Crouch o.ø. Til hesar sangirnar spældi eitt sera vælspælandi orkestur við Gunnari Guttesen á odda. Men Siloakórið sang eisini annað, t.d. Kingosangin: "Nú rennur sólin fríð úr Eysturlondum". Ein góð og fjølbroytt skrá.

Sangbólkurin Salt sang allar sínar sangir uttan ljóðføri. Tey sungu kendar og minni kendar sangir á ein sera yndisligan hátt við nógvum spennandi skiftum: fleirraddað, einraddað, solo, duett, trio o.s.fr. Hesi 7 ungfólkini úr Eysturoynni eru avbera dugnalig og avgjørt verd at hoyra.

Sum nevnt, so verður Norðurlandahúsið nú karmur um hesa konsert, og verður hon í dag, leygardagin.







**UPPLIVINGARNAR BYRJA** við tiltøkum og undirhaldi umborð og halda á, so skjótt fast er undir fóti. Óspilta náttúran, vakra landslagið, yðjandi djóralívið á sjógvi sum á landi og litfagri hetlendski søgu- og mentanararvurin gevur nýggjan íblástur.

Handlarnir í Lerwick liggja stutt frá atløgubryggjuni og hava opið vanligar dagar til kl. 17.00. Til ber at fáa góðar og bíligar dygdarvørur heim aftur við sær úr Hetlandi, teirra millum eisini forkunnigar lutir av hetlendskum uppruna.

Um steðgurin í Hetlandi verður stuttur ella langur, so eru útferðarmøguleikarnir fjølbroyttir. Útferðarfaldari fæst á skrivstovu okkara, so ætlanirnar kunnu leggjast longu heimanífrá.

**3-daga CRUISE**
**mánadag til mikudag**

Gisting á hotelli ............. úr 1.296,-
Privat gisting (B & B)..... úr 1.032,-
Gisting á Vallaraheimi...... úr 907,-

**6-daga CRUISE**
**fríggjadag til mikudag**

Gisting á hotelli ............. úr 3.162,-
Privat gisting (B & B)..... úr 2.051,-
Gisting á Vallaraheimi... úr 1.607,-

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Lerwick og gisting í Hetlandi (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).



Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Joe Jordan (Svøríki) og Frank Ciciliano (USA) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.









**Í Hetlandi:**

- Søgulig støð/bygningar
- Mentanarlig tiltøk
- Vøkur náttúra
- Ríkt djóralív
- Livandi býarlív
- Innkeypsmøguleikar
- Útferðir / aktivitetir

**Umborð:**

- Tollfrí søla
- Dansur / undirhald
- Fitness-venjing
- Góður matur

**HETLAND BLUES-FESTIVALUR**
VERÐUR 25.-27.JUNI 2004
á *www.bluesfestival.shetland.co.uk*
fæst meir at vita um hetta.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo


# Seinasta Tarira-konsertin



*Annan hvítusunnudag hevur Tarira konsert í Vesturkirkjuni. Hetta er seinasta konsertin hjá kórinum í hesum umfarinum*

**Eftir at hava ferðast kring landið, fer Tarira annan hvítusunnudag at hava sína seinastu konsert í hesum umfarinum**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Kórið endar ferðina í Vesturkirkjuni, mánadagin 2. hvítusunnudag kl. 16.00. Framførd verða 3 sera spennandi verk, eitt eftir Robert White og tvey verk eftir Arvo Pärt. Fyrru konsertirnar eydnaðust væl og gleða sangaranir seg nú til at framføra í Havn. Fýra tónleikarar eru við á konsertini, teir eru Sámal Petersen violin, Nicolas Kapnas bratsch, Jens Chr. Guttesen cello, og Heðin Kambsdal, orgul. Sunleif Rasmussen er kórleiðari, konsertin varir ein tíma uttan steðg og er ókeypis. Hetta er sísti møguleiki at hoyra nýggjan og góðan gamlan kórtónleik framførdan av Tariru á hesum sinni. Í heyst fer Tarira á eina norðurlandaferð og tá komi verður aftur, verður norðurlandaferðsskráin framførd heima.



# Lutfalsliga vánaligt kappingarføri



*Vit eru dupult so dýrir sum England og 1,8 ferðir so dýrir sum Ísland. Og tað merkir, at ein føroyingur, sum arbeiðir í flakavinnuni, skal hvønn tann einasta dag gera sama arbeiðið sum tveir skotar og 1,8 íslendarar. Hvønn dag. Og tað er trupult. Hví skulu vit klára tað, tá vit ikki klára tað í nakrari aðrari vinnu hjá okkum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking*

**Lønir í flakavinnuni í Føroyum eru farnar nógv upp seinnu árini, og hetta ávirkar kappingarførið á lønarøkinum. Sera stórur munur er millum føroyska og eitt nú kinverska lønarstøðið**

LØNIR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Kinverska flakavinnan megnar at gjalda fyri 16 arbeiðsfólk, meðan føroyska flakavinnan bert megnar at løna einum arbeiðsfólki fyri sama pening. Kinverjar fáa 16 arbeiðsfólk fyri eina føroyska løn.

Hetta stendur á lesa á heimasíðuni hjá Føroya Sparikassa, sum vísir á norska blaðið Dagens Næringsliv sum keldu.

Sum dømi um lønarmunin verður nevnt, at arbeiðsfólkini í flakavirkissamtakinum Yilfa Group fáa 744 danskar krónur um mánaðin. Ein miðal flakavirkisløn her á landi er 12.000 krónur um mánaðin. Tað merkir við øðrum orðum, at ein flakavirkiskvinna í Føroyum er 16 ferðir dýrari enn ein kinversk.

Flakavirkisarbeiðarar hjá Yilfa, sum í høvuðsheitum eru 18-19 ára gamlar gentur, arbeiða frá klokkan sjey á morgni til klokkan fimm seinnapartin.

– Bíliga arbeiðsmegin er størsti fyrimunurin hjá Kina sum ídnaðarland, sigur varastjórin hjá Yilfa, Kevin Wei, í samrøðu við Dagens Næringsliv.

Alsamt fleiri stórir fiskakeyparar í Europa velja kinverska marknaðin, tá teir keypa fiskaflak. Orsøkin skal finnast í, at kinverjar bjóða somu góðsku fyri lægri prís.

Jan Fossberg arbeiðir í Kina vegna norsku fiskavinnuna, og hann sigur, at vit skulu hækka góðskustøðið til tess at verða betri enn kinverjar.

– Kina hevur í dag fleiri enn 100 stór flakavirki, sum eru á europeiskum góðskustigi og framleiða til kundar í vestanlondum. Norðurlendsku virkini eru framvegis framman fyri tey kinversku, tá tað snýr seg um víðari virkaðar fiskavørur, men eisini á hesum økinum er Kina byrjað at gera um seg. At kappast við Kina við kinverskum treytum er til fánýtis. Um vit skulu sleppa undan beinleiðis kapping, mugu okkara vørur liggja ovastar í príspyramiduni, og góðskan skal vera á einum so mikið høgum stigi, at kinverjar ikki kunnu vera við, sigur Jan Fossberg við Dagens Næringsliv og siteraður á heimasíðuni hjá Føroya Sparikassa.

### Kappast mest við grannar okkara

Meinhard Jacobsen er stjóri í Føroya Fiskavirking, og hann sigur, at kappingarneytarnir hjá føroyingum fyrst og fremst eru grannar okkara og í minni mun Kina.

– Vit hyggja lutfalsliga lítið til Kina, men vit hyggja meira eftir okkara grannum, Íslandi og Onglandi, tí tað er har, sum vit missa fiskin í fyrsta umfari. Vit eru dupult so dýrir sum England og 1,8 ferðir so dýrir sum Ísland. Og tað merkir, at ein føroyingur, sum arbeiðir í flakavinnuni, skal hvønn tann einasta dag gera tað sama arbeiðið sum tveir skotar ella 1,8 íslendarar. Hvønn dag. Og tað er trupult. Hví skulu vit klára tað, tá vit ikki klára tað í nakrari aðrari vinnu hjá okkum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking.

– Hundrað tals milliónir verða investeraðar í fiskaídnaðin í Kina. So fiskaídnaðurin er væl fyri í mun til reinføri. Tað einasta, sum teir ikki hava gjørt nógv burturúr, tað er maskinum, tí teir hava so bíliga arbeiðskraft. Og tí gera teir tað manuelt fyri at fáa maksimala úrtøku. Men vit spíla okkum so nógv út sum vit yvirhøvur orka. Men tað er givið, at tað er trupult hjá okkum at framleiða fisk við tí muni, sum er, sigur Meinhard Jacobsen at enda.





vit geva tær betri ráð...

At keypa ella byggja er ein avgerð, ið ávirkar tilveruna mong ár framyvir. Somuleiðis stinga fleiri spurningar seg upp, tá ið tú fert at mynda heimið: Hvar og hvussu vil eg búgva? Hvørjar møguleikar havi eg?

Í FØROYA BANKA kunnu vit veita tær holla ráðgeving, soleiðis at tú kanst taka avgerðir, ið tú kanst liva við.

Tørvar húsunum ábøtur, kunnu vit hjálpa tær at fíggja útbyggingina, nýggja baðirúmið, køkin o.s.fr.

Tað er skilagott at seta seg í samband við okkum, áðrenn tú fert í holt við at leggja ætlanir - soleiðis fært tú vissu fyri, at tú fært røttu fíggingina, og veitst, hvussu hetta fer at ávirka fíggjarstøðu tína. Vit geva tær betri ráð...

FØROYA BANKI